# Skemt


ABC-REOLIR TIL SØLU
fleiri sektiónir við m.a. hjør
nahyllum og skrivaraborð.
fart. [redacted]

## ABC av-monterar

Andstøðan hevur fleiri ferðir biðið ABC-samgonguna leggja frá sær, og partar av ABC-samgonguni hava róð fram undir, at talið á landsstýrisfólkum skal minka. Nú er so í øllum førum líkt til, at okkurt er við at henda. Enn er ikki komið fram, hvat hendir.

*(lýsing ABC reolir seljast, strika telefonnummarið)*



## Harða lendingin

Lendingin var eitt sindur ógvuslig, og tað visti flogskiparin, tá ið hann stillaði seg í hurðin at siga farvæl við ferðafólkini. Hann roknaði við, at onkur av ferðafólkunum fóru at viðmerkja ógvusligu lendingina, men eingin segði nakað. Ikki fyrr enn ein eldri kona kom fram til hansara.
- Lendu vit ella vórðu vit skotin niður?

## Nú ræður um at lofta sær

Hvussu niðurlendingurin Epeke Zonderland veit, hvønn vegin hann vendir, vita vit ikki. Hann er ein av fimleikarunum, sum nú um dagarnar hevur kappast í HM-kapping í Rotterdam. Epeke sær út til at vera kring og djarvur, men vit siga bara: Lofta tær nú, Epeke!

*(Mynd: Polfoto)*

## Í RANGASTRÚPAN

**Leitaði eftir teimum alt kvøldið**
Jenis bar ikki eyga við Jóhonnu ella Jóninu
*Portal.fo*

**So mugu teir vera tystir nú!**
Terji & Føstufressar: 20 ár millum snapsarnar
*Dimma*

**Okay?**
Nógv vatn undan Vatnajøkli
*Portal.fo*

**Góður spurningur!**
Hvat er forstaður fyri ein staður?
*Dimma*

**Og hvør skal ansa eftirlitinum av eftirlitinum?**
Onkur skal hava eftirlit við eftirlitinum
*Portal.fo*

**Var tað lásamálið?**
Umstrítt mál tryggjaði United sigurin
*Dimma*

**Tað var kreativt!**
Sendistovan sett kreativan stjóra
*Norðlýsið*

**Rudda forsíðuna!**
Hundur yvirkoyrdur í Miðvági
*Portal.fo*

**So mangla bara politikararnar at blíva tað**
Rúsdrekkasøla Landsins blivin vaksin
*Dimma*

**Rudda forsíðuna!**
Kósabúðin fingið nýggja vøru
*Norðlýsið*

**Sterkir sangarar**
Nikolina og Hallur fingu takið at lyfta seg
*Vagaportalurin*

## UMAFTURAFTURUM
### HØGNI DJURHUUS



# Minus ávirkan

Lat ongan iva vera um tað, als ongan. Eg vil gjarna hava samfelagsábyrgd, hóast eg onga ávirkan havi, ella fái á samfelagið. Og heldur ikki hevði havt tað, um eg fór tvætlandi á val annað hvørt ár. So væl spælir demokratiska klaverið ikki, tí tað er falskt. Tað er ongantíð stemmað, og tað verður ongantíð stemmað, so hví stemma?

Samfelagssinni er gandaorðið aftur nú í heyst.

Og tað er okkara lutur, lønartrælanna, at hava hendan samfelagsandan. Sjálvandi renna vit ikki undan okkara ábyrgd, samfelagsábyrgd. Tað sleppa vit ikki. Vit hava samfelagsanda og geva okkara, nú talvan gongur eftir trinitatis til frama fyri landskassan.

Sjálvandi vilja vit hava samfelagsábyrgd, takk. Fyrr var illa.

Brúk er fyri okkara lønarhækkingum, gomlum og komandi, soleiðis á leið 15. hvørt ár. Øll, verður trúttað niður í okkum, øll noyðast at spæla við, nú enn ein kreppa herjar. Bæði fíggjarlig og búskaparlig hesaferð. Hon er ikki sjálvskapt, kreppan. Heldur ikki hendan. Hon kemur uttaneftir. Hon er tó ikki Guds vilji. Men kreppan er so her, sama hvør eigur hana, sama hvør gav hana.

Øll noyðast at lyfta og bera, fáa vit at vita í hvørjum setningi, sum fíggjarlógin er í. Veit ikki, hvørji hini eru, sum noyðast at lyfta og bera. Men, sum sagt, okkara, lønartrælanna, lutur skal ikki liggja eftir, nú politikararnir so miriliga hótta okkum.

Ikki soleiðis at skilja, at eg vil ikki hava meira í løn. Tað vil eg so øgiliga gjarna. Tí fái eg meira í løn, kann eg eisini gjalda meira skatt til annað enn sjúk og/ella gomul, einsamallar mammur og skjúrtufaldsskúlanæmingar, til annað enn eftirlit við vinnurekandi grunnum og føroysk kirkjufólk í Keypmannahavn.

Men tað sleppi eg so ikki. Sama løn er tað sama sum sami skattur, minni løn, minni skattur. Ella, sum tey tjóðskaparliga borgaraligu plaga at siga, minni skattur gevur meira skatt.

Nú ganga øll vit í fakfeløgum, sum hava sáttmála við landskassan, og spyrja: verður verkfall ella verður verkbann, og nær so? Svar fæst ikki. Ja, annað enn at lærararnir fáa eina longri jólaferiu.

Slíkt er annars hent at vita, so til ber at leggja sær trælatilveruna nøkunlunda til rættis.

Svarið átti at komið í seinasta lagi 1.oktober, 1.oktober í ár, tí tá var sáttmálaskeiðið liðugt. Men í Føroyum er ongantíð nakað liðugt, tá tað eigur at vera liðugt.

Tað verður ein søguligur dagur í Føroya søgu, tá ein nýggjur sáttmáli tekur við sama dagin, ikki sama árið ella árið eftir, sum gamli sáttmálin fer í søguna.

Tey samráðast enn, nakrar tímar ein dag um vikuna. Tey samráðast fyri meg millum annað. Men eg veit einki um, hvat tey krevja mína vegna, og heldur ikki, hvat landið vil geva mær. Hvat tey samráðast um fyri meg.

Jú, landsstýrið hevur longu sagt, at eingir pengar eru settir av í fíggjarlógini til lønarhækkingar. Men verða samráðingarnar lidnar dagin fyri jól ella millum jóla og nýggjárs, kann løgtingið fáa pengar til lønarhækking við í fíggjarlógina.

Annars krevst eykajáttanarlóg. Og hon skal vera útreiðsluneytral. Tá fáa fakfeløgini skyldina fyri inntriv og sparingar í heilsuverki og almannaverki og lestrarstuðli og í øðum verkum.

Sama ger. Vit skulu bara vera glað fyri, at onnur hugsa fyri okkum, og viðhvørt eisini um okkum, her í fólkaræðinum.

Orðatøk eru sum oftast tað bera orðaskvaldur.

Men eitt orðatak er tó eftirfarandi: eingin veit á morgni at siga, hvar hon á kvøldi gistir.

Og samráðingarnar, jú, tær halda fram – um eina viku.